Landssjúkrahúsið



# Mammografi screening

## Eitt tilboð til kvinnur millum 50-69 ár

## Til kvinnur 50-69 ár

Mammografiscreening er eitt tilboð til allar kvinnur í aldursbólkinum 50-69 ár um, at fáa tikið røntgenmyndir av bróstinum.
Ein mammografiscreening kann vísa broytingar í bróstinum, sum ikki ber til at merkja við fingrunum.

## Hvat er screening?

Screening er kanning av frískum borgarum, har endamálið er fyribyrgjan av sjúku, ella at minka um deyðstíttleika.
Screening fyri bróstkrabba er eitt tilboð til allar kvinnur í aldursbólkinum 50-69 ár.

## Innbjóðing

Ert tú í hesum aldursbólkinum, fært tú eina innbjóðing umvegis Mínboks til at møta á Landssjúkrahúsinum og fáa tikið røntgenmyndir av bróstunum annaðhvørt ár, frá tú verður innkallað fyrstu ferð, til tú ert 69 ár. Hevur tú ikki Mínboks, fært tú innbjóðingina við vanligum posti.

## Endamál

Endamálið við slíkari kanning er, at kunna staðfesta evt. bróstkrabbatilburðir tíðliga, veita skjóta og harvið mildari viðgerð.
Røntgenmyndir kunnu avdúka broytingar í bróstinum uppá fáar millimetur, sum ikki ber til at merkja við fingrunum.
Jú fyrr krabbamein verður uppdaga, jú størri er møguleikin fyri at sjúkan ikki hevur breitt seg og tí kann lekjast.

## Spurningar ella broytan av tíð

Send boð til Røntgendeildina umvegis Mínboks. Minst til at upplýsa p-tal.
Ella send ein T-post á rtginfo@ls.fo
Tú kanst eisini ringja á tel. 30 47 20 gerandisdagar millum
kl. 09.00-11.00.

## Hvar gongur screeningin fyri seg?

Screeningin gongur fyri seg á Røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum, og er til kvinnur uttan sjúkueyðkenni.
Hevur tú sjúkueyðkenni, er ikki nøktandi við screeningsmammografi, tvs. bert myndatøku. Í slíkum føri skalt tú fara til
tín kommunulækna, og fáa eina ávísing til kliniska mammografi, har serkønur røntgenlækni kannar teg.

## Hvussu gongur screeningin fyri seg?

Screeningin gongur fyri seg sum ein røntgenmyndatøka av bróstunum. Røntgentólið verður kallað ein mammografur.



Eitt starvsfólk, sum er útbúgvin radiografur tekur myndir av bróstinum.
Tú stendur uppi undir kanningini.
Bróstið verður lagt á niðaru plátuna, í meðan ovara plátan verður pressa niður ímóti.
Síðan verða 2-3 myndir tiknar.
Kanningin tekur bert fáar minuttir.

## Hvussu fái eg svar uppá screeningina?

Myndirnar vera kannaðar av tveimum serútbúnum røntgenlæknum, og síðani fært tú skrivligt svar umvegis Minboks, vanliga innan 4 vikur. Hevur tú ikki Minboks fært tú bræv sendandi við Posta.
Er nakað illgrunasamt, verður tú innkallað av nýggjum til eina kliniska mammografikanning, har serkønur røntgenlækni kannar teg.

Donsk tøl vísa á, at 95-98% av screenaðu kvinnunum fáa at vita, at ongin tekin eru um krabbamein.

**2-5% av screenaðu kvinnunum, verða innkallaðar av nýggjum til kliniska mammografikanning.**
**Í einstøkum føri eru tekniskar orsøkir til, at ein kann blíva innkallaður av nýggjum. Td. um góðskan á røntgenmyndunum ikki er nóg góð.**

**Hvussu skal eg fyrireika meg?**

- **Nýt ikki krem, talkum, deodorant og parfumu**
  Við atliti til myndagóðskuna, mást tú ikki nýta hesar vørur á kanningardegnum.

- **Kom í góðari tíð**
  Tað kann verða trupult at finna p-pláss til bilin við Landssjúkrahúsið.

- **Boðað frá serligum viðurskiftum**
  Um serlig viðurskiftir eru, skalt tú seta teg í samband við Røntgendeildina, sí  hvussu á síðu 2.  Serlig viðurskifti kunnu verða t.d. um:

-tú gongur til kontrol fyri bróstkrabba.
-hevur implantat í bróstinum.
-nýtir koyristól, ber menningartarni ella er likamliga skerd sum viðførur, at teknisku tólini skulu stillast á serligan hátt, tá tú skalt kannast.

**Hvussu er innbjóðing til mammografiscreening skipað**
Screening verður í umførum. Tað merkir, at í eitt tíðarskeið uppá einar 3 til 5 vikur, verða kvinnur screenaðar, og so gongur ein tíð til tað aftur verður eitt umfar.  Eftir 2 ár hava  allar kvinnur í aldurbólkinum 50 til 69 ár fingið innbjóðing.

Landssjúkrahúsið

Røntgendeildin  tel 304500   www.ls.fo